# Føroyskir súkklarar stóðu seg væl í Íslandi

**Væl gekk hjá føroysku súkklarunum, ið luttóku í fýra kappingum í Íslandi um vikuskiftið. Kappast bleiv í greinunum einkultstartur og landavegskoyring**

SÚKKLING
*Tíðindaskriv*



*Torkil Veyhe fekk eitt fimta pláss í 70 kilometra landavegskoyringini*

Í føroyska ferðalagnum vóru tríggir unglingar og tríggir vaksnir. Hetta er triðja árið at føroyskir súkklarar luttaka í kappingini Tour de Iceland.

Kappingin Hesa ferð byrjaði við einum stuttum einkultstarti inni í Reykjavík. Koyrt bleiv bert 1 km, og hóast stutta teinin føldist tað sera hart, eftirsum ferðin var nógv hægri enn vanligt.

Fyrstu kappingina vann vinnarin av Statoil Kring Føroyar 2005 Haffsteinn Ægir Geirsson.

Leydagin bleiv kappast í landavegkoyring, og koyrast skuldi 70 km við Tingvøll. Føroyingar stóðu seg væl í hesari kappingini, og tað eydnaðist bæði Torkil Veyhe og Gunnar Dahl-Olsen at koma fyrstir á mál. Unglingarnir koyrdu sama tein sum teir vaksnu allar dagarnar.

### Tvær kappingar sunnudagin

Sunnudagin stóðu tvær kappingar á skránni, ein landavegkoyring um morgunin og síðan ein einkultstartur seinnapartin.

Koyrt bleiv nakað norðan fyri Reykjavík, við Hvalfjørð. Kappingin var jøvn, og tí eydnaðist tað hvørki Eli Christiansen ella Gunnar at sleppa frá feltinum og avgera kappingina. Avgerðin fall tí ikki fyrr enn í síðsta sekundi tá Eli, Gunnar og íslendingurin Gunnlaugur Jónasson sprintaðu um sigurin. Gunnar gjørdist fyrstur, og vann sostatt sín annan sigur. Eli kom beint í hølinum á Gunnari.

So var bert ein kapping eftir - ein spennandi einkultstartur við Bláalón. Nú skuldi avgerast hvør gjørdist samlaður vinnari.

Undan einkultstartinum koyrdu bæði Torkil og Gunnar í gulu førara-troyggjuni. Meðan Torkil førdi trygt, so var munurin millum Gunnar og nummar tvey hjá teimum vaksnu, Gunnlaugur. Gunnlagurur lá samanlagt á øðrum plássi samanlagt, bert fimm sekundir eftir Gunnar.

Torkil gjørdist nummar trý, men vann kortini samanlagt, eftirsum hann hevði koyrt so mikið væl í hinum kappingunum.

Sigmund Olsson og Bergur I. Johansen stóðu seg eisini væl í kappingini, og gjørdu teir ávikavist tvey og trý samanlagt.

Gunnar gjørdist somuleiðis nummar trý í einkultstartinum, men munurin fram til Gunnlaugur gjørdist so mikið stórur, at tað bleiv Gunnlaugur Jónasson, ið gjørdist samlaður vinnari av Tour de Iceland 2005.

### Reykjavík, 1 km einkultstartur:

| NR. | Nafn | Tími |
|---|---|---|
| 1. | Hafsteinn Ægir Geirsson | 01:22.08 |
| 2. | Gunnlaugur Jónasson | 01:26.29 |
| 3. | Gunnar Dahl Olsen | 01:27.42 |
| 4. | Haukur M. Sveinsson | 01:28.21 |
| 5. | Eli Christiansen | 01:28.30 |
| 6. | Árni M Jónsson | 01:29.06 |
| 7. | Gísli Karel | 01:30.22 |
| 8. | Gísli Ólafsson | 01:31.68 |
| 9. | Torkil Veyhe | 01:32.32 |
| 10. | Fylkir Sævarsson | 01:32.44 |
| 11. | Mikael Schou | 01:34.35 |
| 12. | Bergur I. Johansen | 01:34.56 |
| 13. | Hákon Halldórsson | 01:36.32 |
| 14. | Haukur Eggertsson | 01:37.65 |
| 15. | Böðvar Þórisson | 01:37.73 |
| 16. | Hlynur Þorsteinsson | 01:37.82 |
| 17. | Sigmund Olsson | 01:38.08 |
| 18. | Elvar Örn Reynisson | 01:43.22 |
| 19. | Sigfinnur Böðvarsson | 02:54:00 |

### Tingvøllur, 70 km landavegkoyring:

| NR. | Nafn | Tími |
|---|---|---|
| 1. | Gunnar Dahl Olsen | 1:52:58 |
| 2. | Gunnlaugur Jónasson | 1:52:59 |
| 3. | Eli Christiansen | 1:52:59 |
| 4. | Gísli Karel | 1:53:00 |
| 5. | Torkil Veyhe | 1:53:00 |
| 6. | Árni M Jónsson | 1:53:02 |
| 7. | Haukur M. Sveinsson | 1:56:31 |
| 8. | Remi Spillaert | 2:02:58 |
| 9. | Fylkir Sævarsson | 2:02:58 |
| 10. | Haukur Eggertsson | 2:03:14 |
| 11. | Bergur I. Johansen | 2:06:49 |
| 12. | Sigmund Olsson | 2:06:49 |
| 13. | Peter Erler | 2:07:02 |
| 14. | Hákon Halldórsson | 2:08:43 |
| 15. | Gísli Ólafsson | Hætti |
| 16. | Elvar Örn Reynisson | Hætti |

### Hvalfjørður, 64 km landavegkoyring:

| NR. | Nafn | Tími |
|---|---|---|
| 1. | Gunnar Dahl Olsen | 1:48:41 |
| 2. | Eli Christiansen | 1:48:41 |
| 3. | Gunnlaugur Jónasson | 1:48:42 |
| 4. | Torkil Veyhe | 1:48:52 |
| 5. | Hlynur Þorsteinsson | 1:48:52 |
| 6. | Kári Brynjólfsson | 1:48:52 |
| 7. | Árni M Jónsson | 1:49:41 |
| 8. | Sigmund Olsson | 1:59:50 |
| 9. | Remi Spillaert | 2:03:43 |
| 10. | Elvar Örn Reynisson | 2:10:29 |
| 11. | Bergur I. Johansen | 2:12:58 |
| 12. | Peter Erler | 2:18:00 |

### Bláalón, 17 km einkultstartur:

| NR. | Nafn | Tími |
|---|---|---|
| 1. | Hafsteinn Ægir Geirsson | 0:26:50 |
| 2. | Gunnlaugur Jónasson | 0:27:02 |
| 3. | Gunnar Dahl Olsen | 0:27:28 |
| 4. | Árni M Jónsson | 0:28:38 |
| 5. | Eli Christiansen | 0:28:40 |
| 6. | Kári Brynjólfsson | 0:28:46 |
| 7. | Hlynur Þorsteinsson | 0:29:21 |
| 8. | Torkil Veyhe | 0:29:33 |
| 9. | Fylkir Sævarsson | 0:31:05 |
| 10. | Sigmund Olsson | 0:31:58 |
| 11. | Hákon Halldórsson | 0:32:54 |
| 12. | Haukur Eggertsson | 0:33:16 |
| 13. | Elvar Örn Reynisson | 0:33:25 |
| 14. | Bergur I. Jóhansen | 0:35:18 |

### Formula-deildin

| | | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | málmunur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Skála | 22 | 12 -8 - 2 | 48 | 23 | 25 | 44 |
| 2 | B36 | 22 | 12 -7 - 3 | 31 | 13 | 18 | 43 |
| 3 | HB | 22 | 13 -3 - 6 | 59 | 29 | 30 | 42 |
| 4 | NSÍ | 22 | 10 -7 - 5 | 37 | 32 | 5 | 37 |
| 5 | EB/Streymur | 22 | 9 -9 - 4 | 38 | 30 | 8 | 36 |
| 6 | GÍ | 22 | 6 -4 -12 | 29 | 41 | -12 | 22 |
| 7 | KÍ | 22 | 6 -3 -13 | 29 | 41 | -12 | 21 |
| 8 | ÍF | 22 | 5 -6 -11 | 27 | 51 | -24 | 21 |
| 9 | VB | 22 | 5 -5 -12 | 29 | 46 | -17 | 20 |
| 10 | TB | 22 | 3 -6 -13 | 22 | 43 | -21 | 15 |

### 2. deild menn

| | | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | málmunur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | B68 | 13 | 11 -1 - 1 | 49 | 10 | 39 | 34 |
| 2 | B71 | 12 | 10 -1 - 1 | 44 | 7 | 37 | 31 |
| 3 | FSV04 | 13 | 9 -1 - 3 | 39 | 12 | 27 | 28 |
| 4 | AB | 13 | 8 -2 - 3 | 31 | 23 | 8 | 26 |
| 5 | HB | 12 | 6 -1 - 5 | 32 | 25 | 7 | 19 |
| 6 | LÍF | 13 | 4 -2 - 7 | 37 | 37 | 0 | 14 |
| 7 | Sumba | 13 | 4 -1 - 8 | 27 | 46 | -19 | 13 |
| 8 | Royn | 13 | 3 -1 - 9 | 14 | 47 | -33 | 10 |
| 9 | B36 | 13 | 2 -3 - 8 | 13 | 33 | -20 | 9 |
| 10 | GÍ | 13 | 0 -1 -12 | 13 | 59 | -46 | 1 |

# Máltindarnir

### Formula-deildin

| | | |
|---|---|---|
| Sorin Anghel | EB/S | 11 |
| Christian Høgni Jacobsen | NSÍ | 11 |
| Bogi Gregersen | Skála | 11 |
| Hans á Lag | HB | 10 |
| Jónhard Frederiksberg | Skála | 10 |
| Allan Mørkøre | B36 | 9 |
| Súni Olsen | GÍ | 9 |
| Dan Djurhuus | VB | 9 |
| Hans Pauli Samuelsen | EB/S | 8 |
| Tór-Ingar Akselsen | HB | 8 |
| Heðin á Lakjuni | KÍ | 8 |
| Sámal Joensen | GÍ | 7 |
| Rúni Nolsøe | HB | 7 |
| Óli Johannesen | TB | 7 |
| Obele Okeke Onyebuchi | B36 | 6 |
| Sonni L. Petersen | EB/S | 6 |
| Rasmus Nolsøe | HB | 6 |
| Rókur F. Jespersen | HB | 6 |
| Hanus Thorleifsson | Skála | 6 |
| Fróði Benjaminsen | B36 | 5 |
| Krzystof Popczynski | GÍ | 5 |
| Jákup á Borg | HB | 5 |
| Atli Danielsen | KÍ | 5 |
| Hjalgrím Elttør | KÍ | 5 |
| Andy Olsen | NSÍ | 5 |
| Helgi L. Petersen | NSÍ | 5 |
| Milan Kulic | VB | 5 |



*Sorin Anghel hevur við seks málum í seinastu trimum umførunum skotið seg heilt upp á ovastu rók á føroyska máltindinum*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

### 2. deild

| | | |
|---|---|---|
| Clayton Soares | B71 | 17 |
| Súni Fríði Barbá | AB | 15 |
| Jóhan Petur Poulsen | B68 | 13 |
| Sonny Johansen | FSV04 | 11 |
| Uni Arge | HB | 10 |
| Magnus Olsen | B71 | 9 |
| Birgir Joensen | FSV04 | 9 |
| Hendrik Rubeksen | HB | 8 |
| Magnus Skorðalíð | LÍF | 8 |
| Ovi Magnussen | B68 | 7 |
| Øssur Jacobsen | B68 | 7 |
| Kim Poulsen | FSV04 | 6 |
| Tummas Hans Rubeksen | B36 | 5 |
| Eli Hentze | B71 | 5 |
| Tummas Pauli Olsen | B71 | 5 |
| Fróði Joensen | LÍF | 5 |
| Petur Sjúrðaberg | LÍF | 5 |
| Arnbjørn Danielsen | B68 | 4 |
| Símun Hansen | B71 | 4 |
| Jakob Skaaning | Sumba | 4 |
| Jóan Pauli Olsen | Sumba | 4 |
| Rene Thomsen | Sumba | 4 |